

*Í masku og silki slábrokki var Martin Rocka eitt av teimum festligastu innsløgunum á konsertini.*

Metal bólkum, og var satt at siga eitt sindur skuffaður av tí manglandi fjøllbroytninum.

### Ungar sangkvinnur bergtóku

Í endaveitsluni aftan á kappingina, var serliga ein ung dama, sum fekk nógv herðaklapp. 20 ára gamla meksikanska Ximena Sariana bergtók øll við síni framførslu á konsertini. Sum eitt eldgos sprændi hon orkumiklar tónar úr munninum, har var so nógv power á røddini, at sjálvt harðastu tungmálmsbólkarnir ikki megnaðu at fylgja við. Samstundis var unga og óskyldiga útsjóndin í so sterkari andsøgn til røddina, at tú vart tikin av bóli. Samanumtikið gjørdist tað bert til eitt fimta plass hjá jassutta Meksikanska bólkinum Feliz No Cumpleanos. Men tey vera seint gloymd millum áskoðararnar, og er heimurin ikki deyvur, verður nógv at hoyra til Ximenu í framtíðini.

Bólkurin MEA úr Wales hevði somuleiðis eina songkvinnu, sum bergtók. Bólkurin spældi keðiligan NU-Metal tónleik við sera sterkum ávísingum til Evanescense. Men Vanessa Nicholas hevði eina framúrskandi vakra og orkumikla rødd, sum longu í ljóðroyndini blásti meg um koll.



*Rættiliga fitt av føroyingum var á konsertini í Astoria*

### Skotar og Niðurlendingar

Millum áskoðararnar, tá vinnarin skuldi finnast í GBOB, vóru serliga tvey lond uppi og vendu. Niðurlond og Skotland. Hetta vóru eisini teir báðir bólkarnir, ið eg persónliga væntaði fóru at berjast um sigurin. Skotsku The Rise spældu eitt slag av gjøgnumførdum popppunkrokki við einum sletti trendi UK poppi. Teir vóru kekkaðir og dugdu síni ting. Hetta var nakað av tí mest gjøgnumførda á kvøldinum, og tryggjaði teimum triðja pláss.

Drive Like Maria úr Niðurlondum var ein annarleiðis bólkur, við syngjandi trummuleikara og kvinnuligum gittarleikara brutu tey frá heildini. Stílurin var eitt sindur í trá við White Stripes, og løgini vóru knasandi góð, nóg góð til at tryggja annað pláss.



*Skotsku The Rise spældu eitt slag av gjøgnumførdum popppunkrokki við einum sletti trendi UK poppi*



*Ximena Sarinana úr meksikanska bólkinum Feliz No Cumpleanos bergtók øll*

### Ukrainsku Sic

Bólkurin á fjórða plássi var TOL úr Ukrainu. Hetta var ein ruskmálmsbólkur við ávísingum til Korn og aðrar harðar bólkar. Hann minti ikki sørt um okkara egnu Sic. Sangarin var frálíkur og skrálaði av heilum hjarta. Hetta var ein flokkur av ræðandi illum monnum, og tú føldi, at teir høvdu okkurt á hjarta.

Eitt forkunnugt innslag var Suður afrikanski Martin Rocka And The Sick Shop. Ein rokkabilly bólkur við einum garrvillum manni í silkislábrokk og masku, sum byrjaði konsertina við at siga, "There are only three kings: Drinking, Fucking and Elvis", so var støðið lagt. Teir buldraðu avstað við eini tí festligastu framførsluni á kvøldinum.

### Tann filipinski Hasselhoff

Landið við flest luttakandi bólkum var Filipinirnar, ikki færri enn 800 bólkar søktu um luttøku og 200 komu í innleiðandi umførini. Av hesum gjørdist The Authority vinnari. Her var talan um ein bólk, ið spældi væl, og filipinsku fjeppararnir og miðlarnar vóru væl umboðaðir framman fyri pallin. Men tónleikurin var, sum tey verru grandprix løgini í 80'unum ella útgávurnar hjá David Hasselhoff. Mentan er ymisk frá landi til lands. Hetta vísti kanska meira enn nakað annað styrkina í GBOB. Tónleikarar og tónleikaáhugaði úr 24 ymiskum londum hittast og skifta um mentanarupplivingar. Hetta er stórsligið og sera, sera flott.

# Vágspoppur í Astoria

**Aftan á at allir bólkarnir høvdu spælt, bað eg fýra føroyskar útisetar í London um at koma við sínum boði um, hvør fór at vinna.**

GBOB

### Jens, í ljóðlæru í London

Eg vænti, at tað verður ímillum Føroyar, Noreg og Skotland. Norski bólkurin spældi væl og løgini vóru fangandi og gjøgnumførd. Skotland vístu, at hetta høvdu teir roynt fyrr, hetta var bara eitt annað job. Teir virkaðu sannførandi. So var eisini kjøt á sangunum hjá teimum. Marius, haldi eg, hevur ein góðan møguleika, tí løgini høvdu dýpd. Hetta var eisini einasti bólkur, sum virkaði produseraður, har var hugsað um detaljir, og allir vistu hvat hinir gjørdu.

### Kristina, dansar í London

Eg vænti, at Meksiko vinnur. Tey gjørdu inntrykk, tey vóru fantastisk. Mær dámdi eisini væl sviar, men eg minnist ikki hví, kanska tí teir vóru fyrsti bólkur á pallin. Jamaica var eisini feitt, teir høvdu eitt feitt groove. Eg vænti tíanverri ikk,i at Marius gerst millum seks teir bestu bólkarnar. Eg haldi ikki teir komu nóg væl út um pallkantin.

### Bjørt, lesir sálarfrøði í London

Eg vænti, at Skotland vinnur, skotar høvdu eina góða framførslu. Mær dámdi eisini væl Marius, hann syngur væl, og mær dámdi løgini, tey vóru feit. Meksiko vóru eisini øgiliga original.

### Hans Juul, lesur grafiskt design í London

Tað er hopleyst at siga, hvør vinnur - Her eru 24 bólkar, sum eru so ymiskir. Mær persónliga dámdi væl Marius. Men Meksiko var eisini eitt stuttligt innslag. Eg haldi tey hava eina stóra framtíð.